# Tíðarlinja

**Skaldsøgur, yrkingar, barnabøkur** | **Modernisma**

MÁL OG BÓKMENTIR

## 1900–1930:

### SYMBOLISMA OG REALISMA



- Símun av Skarði yrkir *Tú alfagra land mítt* á háskúlanum í Føgrulíð, 1906.
- Barnablaðið verður stovnað, 1907.
- Jákup Dahl ger í 1908 mállæru til skúlabrúks.
- Fyrsta skaldsøgan, *Bábelstornið*, eftir Regin í Líð kemur út í 1909.
- Fyrsta yrkingasavnið, *Yrkingar*, eftir Janus Djurhuus kemur út í 1914.

Sámal Joensen-Mikines, Skaldið H.A. Djurhuus, 1933



- Tíðarritið *Varðin* kemur út, 1921.
- Fyrsta barnabókin, *Barnarímur*, eftir H.A. Djurhuus kemur út í 1922.
- Fyrsta ungdómsskaldsøgan, *Lognbrá*, eftir Heðin Brú, kemur út í 1930.

## 1930–1960:

### MODERNITETSKRITIKKUR

- William Heinesen gevur í 1934 út fyrstu skaldsøgu sína, *Blæsende Gry*.
- Victor Danielsen verður liðugur at týða *Bíbliuna* í 1949.
- Fyrsta góðkenda bíbliutýðingin kemur út í 1961. Jákup Dahl og K. O. Viderø týddu.




- Rithøvundafelagið verður stovnað, 1957.



Niels Kruse, *Vetrarsól á Eiði*, 1941

## 1960–1980:

### MODERNISMA

- Guðrið Helmsdal og Steinbjørn B. Jacobsen geva fyrstu modernistisku yrkingasøvnini út.



- Í 1965 vinnur William Heinesen Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri skaldsøguna *Det gode håb*.



- Í 1970-árunum koma fleiri samfelagskritiskar yrkingar og skaldsøgur.



Ingálvur av Reyni, *Bókahandilin*, 1964

## 1980–2000:

### POSTMODERNISMA

- Postmodernistiskur skaldskapur tekur seg upp í Føroyum.
- Kvinnuligir høvundar gera av álvara vart við seg. Í 1971 kemur fyrsta føroyska skaldsøgan, skrivað av kvinnu: *Rannvá*, eftir Dagmar Joensen-Næs.




- Einar Petersen gevur út fyrstu krimibókina: *Deyðin sendir apríl* í 1987.
- Í 1986 vinnur Rói Patursson Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið *Líkasum*.
- Barnabókaklubbin verður settur á stovn, 1986.

BÓKAKLUBBIN

## 2000–2020:

### VISTKRITIKKUR O.A.

- Nógv yrkingasøvn og nógvar skaldsøgur koma út.
- Vistkritikkur tekur seg fram.



Edward Fuglø, *Burtur á heiði*, 2011

- Tónleikalívið blómar.
- Barnablaðið Píka7 sær dagsins ljós, 2017.




POLITIKKUR OG SAMFELAG

### 1900–1930

- Sambandsflokkurin verður stovnaður í 1906.
- Sjálvstýrisflokkurin verður stovnaður í 1909.
- Fyrra heimskríggj, 1914–18.



- Í 1912 samtykkir løgtingið, at danskt skal vera undirvísingarmál.

### 1930–1960

- Í 1938 verður føroyskt fullfíggjað lærugrein og undirvísingarmál.
- Seinna heimskríggj, 1939–45.



- Fólkaatkvøðan um sjálvstýri, 1946.
- Mentanargrunnur landsins verður settur á stovn, 1946.
- Heimastýrislógin kemur í gildi í 1948.
- Bókadeild Føroya Lærarafelags verður stovnað í 1956.
- Útvarp Føroya verður stovnað í 1957.



### 1960–1980



- Danmark fer upp í EEC (nú ES). Føroyar og Grønland atkvøða ímóti.

### 1980–2000

- Sjónvarp Føroya verður stovnað, 1984.
- Í 1990 kemur fyrsti føroyski spælifilmurin *Atlantic Rhapsody*. Katrin Ottarsdóttir skrivaði og leikstjórnaði.
- Kreppan í 1992. Føroyar verða settar undir danska umsiting.






### 2000–2020

- Loysingarspurningurin kyknar av nýggjum við sjálvstýrislandsstýrinum, sum situr millum 1998–2004.
- Tiltakið Free Føroyar er um alt landið.
- G! festivalurin og summarfestivalurin verða hildnir.



- Korona herjar, 2019.

